# »HEY, YOU G

**TÓNLEIKUR** Kvøldið, føroysku prædikumenninir inntóku danska kjøtmarknaðin








## The Reverends:

Niklas Torsteinsson, sang
Janus Kampmann, guitar og kórdrongur
Jens V. Jacobsen, guitar og kórdrongur
Kristin Nolsøe Bech, bass
Rúni Mouritsen, trummur.
Fløgan, When you´re done, er útgivin av plátufelagnum Tutl
Vitja The Reverends á www.thereverends.com ella á Myspace: Thereverendsmusic.

Sissal Kampmann

Leygarkvøldið 17. apríl, gjørdi føroyski countrybólkurin The Reverends innrás á danskt/íslenskt. Meir nágreiniligt, - á altjóða øki. Høvi var altjóða útgávugildið fyri fløguna When you´re done, sum var hildið á barrini Jolene, sum liggur í trendy, industriella kjøtbýnum mitt í Keypmannahavn. Veður - og ølguðarnir vóru við prædikumonnunum hetta kvøldið, og tá teir byrjaðu at spæla kl. 20.30, vóru umleið 50 fólk savnaði í smáu, myrku men innbjóðandi hølunum.

Køldu, ókeypis ølirnar frá Føroya Bjór gingu sum heitt breyð, og gestirnir, ið bæði vóru føroyingar, danir og íslendarar, stóðu og sótu tættpakkaði og lurtaðu í andakt, tá bólkurin legið út við at spæla heitislagið á fløguni, When you´re done. Væntaninar millum áhoyraranar vóru stórar hetta kvøldið. Rosa Heinesen, sum var ein av gestunum, segði í samrøðu undan konsertina, at hennara persónligu væntanir til bólkin og til kvøldið sum heild vóru, at hon væntaði at vera ordiliga glað og peppað í sínum cowboyhatti, og hon ætlaði at countrya alla náttina.

- Eg fari ikki í mín cowboyhatt uttan so, at tað er eitt serligt høvi, sum t. d. á Roskilde og á G!, greiddi hon mær frá.

- Tá eg eri farin í hattin hjá mær, so vænti eg, at mínar væntanir vera uppfyltar. Eg gangi altso ikki allan vegin oman eftir Istedgade í cowboyhatti fyri nothing, segði hon avgjørd at enda.

Ein ung genta, sum sat millum áhoyrararnar, hevði eisini stór krøv og væntanir og gleddi seg til at hoyra The Reverends live. Inntil nú, hevði hon bert hoyrt fløguna. Unga kvinnan segði, at hon fór ikki frá einum góðum videofilmi fyri at blíva skuffað, so hon væntaði av bólkinum, at teir levereaðu vøruna.

Tað vóru harvið sett høg krøv og stórar væntanir til The Reverends frá áhoyrarunum, sum tó ikki sóu út til at ørkymla seg um støðuna. Teir tóktust haraftuímóti at gleða seg til at undirhalda fjøldina og til at sleppa at spæla country!

Bólkurin, The Reverends, var stovnaður í Keypmannahavn í 2005. Sum bólkurin ger vart við í tíðindaskrivinum, eru prædikumenninir á eini missión, á eini ferð, ið poetiskt og melodisk